

## FRÁBOÐAN UM ÍKOMNAN SKAÐA Á LANDSVEGI

Landsverk hevur um hendi vegauppgávur og skal tryggja, at karmar fyri ferðslu eru nøktandi. Í førum, har hending á landsvegi ber við sær skaða, ber til at søkja um endurgjald frá Landsverki.

Eitt endurgjaldskrav kann m.a. koma fyri, um ein bilførari koyrir í eitt hol í landsvegnum og fær skaða á dekkið, ella um eitt fólk til gongu dettur um lut og kemur til skaða. Í hesum førum kann talan vera um skaða á bil ella persón, og kunnu hesi endurgjaldskrøv beinast til Landsverk til støðutakan.

## LÓGGÁVA UM ENDURGJALD

Endurgjaldsábyrgdin hjá Landsverki skal viðgerast eftir teimum almennu endurgjaldsreglunum. Hetta merkir m.a., at Landsverk kann koma undir endurgjaldsábyrgd, um so er, at landsvegurin ikki er í nóg góðum standi og boðað er ikki frá hesum, ella um Landsverk á annan hátt vísir vanrøkt, sum beinleiðis er orsøk til skaða.

Endurgjaldsábyrgdin er culpa ábyrgd, sum er ment í venju og í løgfrøðiligum bókmentum.

## HVUSSU SØKI EG UM ENDURGJALD

Søkjast kann um endurgjald, um ein skaði er farin fram á landsvegi. Neyðugt er við nágreiniligari frágreiðing og skjalfesting av endurgjaldskravi, gjarna við myndum av skaða og umstøðunum. Niðanfyri er ein frymil at fylla út og senda til Landsverk:

*Landsverk*

*Tinghúsvegur 5*

*100 Tórshavn*

*lv@lv.fo*

Tlf: 340 800

**Títt endurgjaldskrav skal innihalda hesar upplýsingar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bilmerki: | | Modell ella seria: | |
| Árgangur: | | Litur: | |
| Nummarpláta: | | Kilometratal: | |

| | |
|---|---|
| Navn: | |
| Bústaður: | |
| Telefonnummar: | |
| Teldupostur: | |
| Er skaðin fráboðaður Landsverki: | |
| Lýsing av hending: | |

| | |
|---|---|
| Lýsing av, hvar skaðin er hendur, og dagfesting fyri skaðan: | |
| Stødd á endurgjaldskravi: | |
| Greið frá, hvussu koyrilíkindi vóru: | |
| Var nøkur skelting á økinum: | |

Minst til at senda myndir av skaða og skaðastaði við.